

# Nú tora k
# at mótmæla og

KUBANAR ERU **TROYTTIR** AV TEIRRI GOMLU STÝRISSKIPANINI, OG TEIR VILJA HAVA SKJÓTAR POLITISKAR **BROYTINGAR**, SUM KUNNU HAVA VIÐ SÆR, AT BÚSKAPURIN KEMUR Á **FØTUR.** TEIR VILJA EISINI HAVA EITT GOTT OG OPIÐ SAMBAND VIÐ UMHEIMIN, OG AT ALT SVIK Í TEIRRI OVASTU LEIÐSLUNI VERÐUR **RUDDAÐ** BURTUR



**STÝRISSKIPAN**

**Árni Joensen**
arni@sosialurin.fo

Í hesum tíðum koma støðugt fleiri frásagnir úr Kuba, sum siga frá fólki, ið krevja broytingar í teirri politisku og búskaparligu skipanini í landinum. Tað unga ættarliðið er ikki nøgt við ein búskap, sum tykist standa í stað, og sum forðar teimum í at finna egna lívsleið og at forvinna meiri pengar.

Sjálvt tann ovasti leiðarin í teirri katólsku kirkjuni í landinum, kardinalurin Jaime Ortega, hevur tikið blaðið frá munninum og sagt, at landið stendur fyri stórum avbjóðingum, og at fólkið er vorðið ótolið. Sambært kardinalinum er kubanska tjóðin samd um, at stjórnin noyðist at taka neyðug stig fyri at bøta um korini hjá teimum 11 milliónunum, sum búgva á oynni.

– Stjórnin drálar við at gera eftir ynski fólksins, og tað gera bara, at fólk blíva enn meiri ótolin, og misnøgdin veksur, segði kardinalurin í samrøðu við eitt kubanskt blað fyri stuttum. Samrøðan var óvanlig, tí kirkjuleiðarin var sjáldsama bersøgin, skrivar Reuters.

Kubanararnir í Havanna og útlagnu landsmenn teirra í Florida eru á einum máli um, at tað fyrst og fremst tann politiska skipanin, sum forðar fólkinum framburð. At landið bleiv rakt av trimum hørðum og oyðandi ódnum í fjør hevur ikki bøtt um støðuna. Harafturat rakar altjóða fíggjarkreppan landið so meint, at gjaldoyragoymslan er tømd, samstundis sum myndugleikarnir góvust við at rinda rokningar frá útlendskum veitarum.

## Svik

Hvørja viku eru mótmælisgongur í Havanna. Fyriskipararnir eru fleiri, eitt nú felagsskapurin »Kvinnurnar í hvítum«, sum umboðar skyldfólk og vinfólk hjá politiskum andstøðingum, sum eru í fongsli ella í arbeiðslegu.

Men sambært kubanska søgufrøðinginum Estaban Morales er tað ikki teir smáu mótmælandi felagsskapirnir, sum hótta stýrið hjá Raul Castro, forseta.

– Tvørturímóti er stýrið sjálvt ein hóttan ímóti teirri kommunistisku skipanini orsakað av teirri stóru korrupsjónini, sum er partur av gerandisdegnum heilt upp á ovastu rók í stjórnini, skrivaði Esteban Morales á heimasíðuni hjá kubanska listarmanna- og rithøvundafelagnum. Hetta er ein heimasíða hjá tí almenna, og tí eru atfinningarnar óvanliga hvassorðaðar. Aftaná søgdu eygleiðarar, at Morales hevði brotið fleiri skrivaðar og óskrivaðar reglur, tá hann dittaði sær at finnast at landsins ovastu leiðslu.



*»Kvinnurnar í hvítum« er ein mótmælisfelagsskapur, sum umboðar skyldfólk og vinfólk hjá politiskum andstøðingum, sum eru í fongsli ella í arbeiðslegu. Hvønn sunnudag ganga tey ígjøgnum gøturnar í Havanna, og eins og á hesari myndini verða tey stundum órógvað av fólki, sum styðja stýrið*
Mynd: Reuters

## Castro skyldina

Sambært søgufrøðinginum hevur tann ovasta leiðslan í Kuba longu avrátt eitt innanhýsis býri, um tað skuldi hent, at tann politiska skipanin fer í upployson. Hann samanbar hetta við, hvussu teir sokallaðu oljugarkarnir ríkaðu seg upp eftir lítlari og ongari tíð, tá Sovjetsamveldið datt sundur í 1991.

– Tað eru teir í landsins ovastu leiðslu, sum bara bíða eftir at fáa fatur á landsins tilfeingi, skrivaði Morales.

Hóast orðalag hansara er óvanliga hvast, er hetta ikki fyrstu ferð, at limir í listarfeløgum í Kuba gera vart við sína misnøgd við ta kommunistisku skipanina, men kortini hava atfinningarnar ikki givið nakað beinleiðis úrslit. Men eygleiðarar vænta, at orðini hjá Esteban Morales hava vakt størri ans, hóast heldur ikki hann hevur torað at sagt, at Castro-ættin hevur høvuðsábyrgdina av gongdini í Kuba tey 51 árini síðani ta kommunistisku kollveltingina, skrivar Reuters.

Tá Felipe Perez Roque, uttanríkisráðharri, og Carlos Lage, varaforseti, noyddust at leggja frá sær fyri tveimum árum síðani eftir illgruna um svik, skrivaði Fidel Castro í einum av sínum drúgvu brøvum, at teir báðir maktaðu ikki at standa ímóti tí søta, sum vald hevur við sær, og tí máttu teir leggja frá sær.

## Nærkast endanum

Stjórin á Norsk Utenrikspolitisk Institutts, Jan Egeland, hevur í mong ár fylgt við politisku gongdini í Kuba. Hann væntar ongar stórvegis broytingar í Kuba í bræði, sjálvt um nógvar og harðar røddir finnast at stýrinum.

– Hetta fer at taka tíð, men eg haldi, mat vit nú síggja byrjanina til endan hjá tí meiri enn 50 ára gamla kommunistastýrinum, sigur Jan Egeland við Aftenposten. Hann sigur, at verandi stýrislag hevur onga framtíð í Kuba. Annaðhvørt fer tað í upployson, ella kemur okkurt meiri demokratiskt ístaðin fyri. Jan Egeland vísir samstundis á, at Kuba hevur verið í kreppu fyrr so sum í 1991, tá Sovjetsamveldið datt sundur og sjálpin til Kuba steðgaði.

Norski serfrøðingurin heldur, at Barack Obama, forseti, eigur at skunda sær at seta úr gildi nøkur av teimum amerikonsku handilstiltøkunum ímóti Kuba.

– Amerikonsku tiltøkini er púra burturvið og ikki til gagns fyri nakran. Eg vænti, at sum frá líður fer forsetin at taka nøkur av tiltøkunum av, sigur Jan Egeland við Aftenposten.

(Kelda: Aftenposten)